# Jóansøku-festivalurin – størsta tiltak í oynni nakrantíð



**Í fjør gjørdi jóansøkan sum stevna eitt stórt lop frameftir. Frá at hava verið ein stór ítróttar- og mentanarstevna í 80 ár, so gjørdist jóansøkan eisini ein stór tónleikastevna við tað, at Jóansøkufestivalurin sá dagsins ljós**

JÓANSØKU-FESTIVALUR

Í hesum tíðum, har alsamt fleiri tónleikafestivalar eru í Føroyum, var hetta eitt neyðugt stig, tí kappingin um at draga til sín fólk gerst størri og størri hvørt ár – og krøvini frá fólki til tiltøkini vaksa eisini alsamt. Krøvini til tær tradisjonellu stevnurnar, har kappróður fyrr var hæddarpunktið, eru greið: Tað yngra ættarliðið krevur endurnýgging og fleiri og betri tilboð.

Fyri jóansøkuna er Jóansøkufestivalurin eitt gott og neyðugt stig rætta vegin. Hugaligt var eisini at síggja, at stuðul í fjør á ymsan hátt kom úr allari oynni – kommunur og Lions Club stuðlaðu fíggjarliga, Suðuroyar Sparikassi og aðrar fyritøkur sponsoreraðu festivalin, meðan fólk og fyritøkur úr allari oynni hjálptu til við tí praktiska, tó at tær tyngstu byrðarnar blivu lyftar á Tvøroyri.

### Jóansøkufestivalurin 2005

Jóansøkufestivalurin 2005 eydnaðist framúr væl og gav eisini íblástur til at halda áfram og arbeiða miðvíst við at skapa eitt stórt afturvendandi tiltak á jóansøku. Fyri áskoðarar og áhoyrarar var tað kanska serliga spennandi at síggja og uppliva rockbólkin Sweet, men eisini tær føroysku framførslurnar prógvaðu, at tónleikurin í Føroyum er stutt frá altjóða gjøgnumbroti.

### Jóansøkufestivalurin 2006

Í ár er Jóansøkan í Vági, og byrjaðu fyrireikingarnar til Jóansøkufestivalin 2006 longu í vikuni eftir Jóansøkuna 2005. Leisturin er hin sami sum til jóansøkuna í 2005, og er talan um eitt tiltak, sum higartil hevur verður skipað í felag av fólkum úr Vági og av Tvøroyri, og koma fólk úr allari oynni eisini at hjálpa til við teimum praktisku tingunum á sjálvum festivalinum.

Sponsoravtalað er gjørd við íslendska bryggjaríið Vífilfell, sum nú hevur gjørt eitt ølsamtak við Restorffs Bryggjarí. Og hetta er í stóran mun við til at tað ber til at skapa ein so stóran og góðan festival í ár.

### Festivalur í 4 dagar

Jóansøkufestivalurin 2006 kemur at fevna um dagarnar frá tórsdegnum 22. juni til sunnudagin 25. juni. Tórsdagin 22. juni verða tiltøk innandura í mentanar- og felagshúsunum í Vági. Fríggjadagin 23. juni og leygardagin 24. juni eru høvuðsdagarnir á festivalinum, og verða tá tiltøk uttandura – sokallað Open-Air konsertir. Sunnudagin 25. juni verða tónleikatiltøk innandura í mentunar- og felagshúsunum í Vági. Tey sokallaðu vikuskiftispassini geva atgongd til Open-Air konsertina fríggjakvøld og leygarkvøld, meðan hini tiltøkini antin er ókeypis ella krevja sjálvstøðugt atgongugjald.

### Størsta tiltak í oynni nakrantíð

Hugsandi er, at Jóansøkufestivalurin 2006 verður tað størsta einstaka tiltakið í Suðuroynni nakrantíð, og setur hetta eisini heilt stór krøv til fyriskipan. Nógv fólk hava sjálvboðin lagt nógva orku í at fyriskipa, umframt at Kunningarstovan í Vági eisini er við í fyrireikingararbeiðinum.

Fyrireikingarnar hava gingið væl. Longu tíðliga í fjørheyst vórðu tær fyrstu avtalurnar gjørdar við útlendsk orkestur. Eftir hetta eru fleiri avtalur gjørdar, bæði við útlendsk og føroysk tónleikanøvn. Og við nøvnum sum Andrew Strong, Carpark North, Land og Synir, Den Danske Mafia, Thorbjørn Risager: Blue 7, Páll Finnur Páll, Deja Vu, 200, Hanus G. Johansen, Rasmus Lyberth, Maria Guttesen, The Dreams og ikki minst tey lokalu, Forgery, Eyðun og Neil og semi-lokalu, Robert og Vinmenn – og tónleiki fevn-andi um rock, pop, blues, fólkatónleik, jazz og klassiskan tónleik, so eru lunnar lagdir undir einum minningarríkum og framúr góðum tónleikatiltaki á Eiðinum á Jóansøkufestivalinum.

Ver hjartaliga vælkomin á Jóansøkufestivalin 2006.

